# Sangarar savnaðust á stevnu

**Einir 200 sangarar úr 12 ymiskum kórum luttóku á klórstevnu á Eysturskúlanum leygardagin**

KÓRSTEVNA
*Jan Müller*

Leygardagin varð kórstevna hildin á Eysturskúlanum í Havn. 12 kór umframt stórt felagskór høvdu konsert seinnapartin.

Tað var Kórsamband Føroya, sum skipaði fyri kórstevnuni, har kór úr at kalla øllum landinum luttóku. Kórini vóru rættiliga ymisk. Frá kendum kórum við nógvum royndum, so sum Havnarkórið og Kirkjukórið Ljómur í Vági, til nýggja Kvívíkarkórið og Dreingjakórið undir Brúnni, sum luttóku á kórstevnu fyri fyrstu ferð.

Eisini var stórt felagskór við á konsertini, sum varð hildin í auluni á Eysturskúlanum seinnapartin leygardagin.

Stevnuluttakararnir møttu á skúlanum leygarmorgunin klokkan níggu, og felagsvenjingin byrjaði so umleið ein hálvan tíma seinni, eftir at fólk høvdu heilsað upp á hvønn annan, fingið sær ein kaffimun og teknað seg til veitsluna, sum var um kvøldið, eftir at konsertin var liðug.

Skráirnar, ymsu kórini framførdu, vóru rættiliga ymiskar. Alt frá kendum, føroyskum forsturlandssangum, norðurlendskum sangum, negro spirituals, musical og heilt til klassiskan kórtónleik av J.S. Bach. Og sum heild má sigast, at framførslurnar vóru væleydnaðar.

Tó slepst ikki udnan at nevna Kamarkórið, sum umframt at syngja rættiliga væl, eisini hevði eina rímiliga skemtiliga framførslu, sum saman við góða sanginum var eitt avgjørt hæddarpunkt á konsertini.

Men kórið, sum fekk flestu klappini, var Dreingjakórið undir Brúnni, sum fyri stóran part var mannað við heilt nýggjum sangarum. Eini nýggjari »generatión«, sum ein av leiðarunum segði, áðrenn framførslan byrjaði.

Stóra felagskórið, sum taldi einar 150-160 sangarar, framførdi eisini eina blandaðað skrá. Føroyskar fosturlandssangir, nýggjar sangir, bæði uppruna føroyskan tekst við føroyskum lagi av ávikavist Hanusi Kamban og Kára Bæk, og týðing, sum Aksel Tórgarð í ár hevur gjørt úr svenskum, umframt klassiskan, týskan kórtónleik og amerikanskan musicaltónleik. Seks ymiskir kórleiðarar vandu við og stjórnaðu stóra felagskórinum, sum byrjaði og endaði konsertina.

Ein teirra, sum stjórnaði felagskórinum, var » the grand old man« í føroyskum kórhøpi, tann meira enn 70 ára gamli Ólavur Hátún, sum umframt felagskórinum stjórnaði ikki færri enn trimum kórum á stevnuni. Hann hevur í vetur vant Havnarkórið, Vágakórið og Kvívíkarkórið.

Kórstevnurnar hava ikki verið hildnar á hvørjum ári seinnu tíðina. Men næsta ár verður kortini aftur kórstevna. Tað boðaðu tey úr Felagskórinum Gøta-Leirvík frá, fylgd av nógvum lógvabrestum frá kórsangarunum á stevnuni.

Tað verða næsta ár 10 ár, síðan Felagskórið Gøta Leirvík seinast hevði kórstevnuna, og tað hildu tey vera eitt gott høvi til at hava eina stevnu aftur. Leiðari hjá kórinum er í dag Martin Mouritsen úr Havn.



*Ólavur Hátún »the grand old man« í kórhøpi frøddist inniliga, tá hann hoyrdi dreingjakórið »Undir Brúnni«*



*Rútmiska kórið í Hoydølum undir leiðslu av Zacharias Sørensen*



*Vágakórið her undir leiðslu av ongum minni enn Ólavi Hátún*